Miðvikan



Óli Jacobsen
olijacobsen@post.olivant.fo

## Vattarnes í Íslandi:

# Helvtin av íbúgvarunum vóru lorvíkingar

**Smyril Line hevur aftur skipað fyri ferð til Íslands í fótasporum okkara útróðrar- og fiskimanna. Eins og í fjør hava vit í trimum Miðvikum áhugaverda føroyska søgu í Íslandi heim við okkum**

**1. partur**

Tað var í september seinasta ár, at Smyril Line skipaði fyri eini ferð yvir á Seyðisfjørðin at fylgja slóðina hjá føroyskum fiskimonnum í Íslandi. Hóast skotbráðið var stutt, var áhugin so stórur, at eftir bert fáum vikum høvdu eini 90 fólk meldað seg til.

Hetta vóru fyri ein stóran part fólk, sum høvdu ættarfólk, pápar og abbar, sum høvdu fiskað undir Íslandi. Eisini vóru fleiri menn, sum sjálvir høvdu fiskað á hesum leiðum.

Ferðin var skipað soleiðis, at komið varð inn týsmorgun og farið avstað aftur mikukvøld. Hetta gav tveir dagar í landi. Ísland er stórt, so tað er avmarkað, hvusssu víða kann komast so stutta tíð. Men tíðin var kortini nóg long til at fáa eina frálíka uppliving.

Í fjør var farið norðureftir á Bakkafjørðin og Vopnafjørðin tann fyrra dagin Norrøna lá inni. Seinna dagin var farið út á Skálanes á suðurarminum av Seyðisfjørðinum.

Skipað varð fyri minnishaldi á kirkjugarðinum við grøvina hjá fimm av teimum sjey monnunum av Riddaranum, sum druknaðu við Langanes í 1927. Aftaná var vitjað í kirkjuni á Seyðisfirði, har prestur hevði minningarorð um hesar menn. Eisini var íslendskur kórsangur.

Henda ferðin var sera væl umtókt, og fólk vóru ógvuliga fegin um at hava verið við. Tey fingu eisini nógv burtur úr, tí á bussferðini varð greitt frá føroysku søguni, sum hevði samband við tey pláss, sum vóru vitjað. Tá tað vóru tveir bussar mátti frásøgumaðurin ganga millum bussarnar. Men hetta riggaði eisini væl.

Tað sum setti ein serligan dám á túrin, var tann stóri blíðskapurin, sum íslendingar vístu føroysku gestunum.

### Nýggja ferðin eins væleydnað

Smyril-Line skipaði so aftur fyri eini líknandi ferð seinast í apríl. Aftur var stór luttøka, úti við 100 fólk.

Enn einaferð var túrurin sera væleydnaður og blíðskapurin framúr. Eins og í fjør heyst var tann fyrri dagurin ein fagnaðardagur til veður við sól allan dagin, meðan tann seinni var heldur dimmari við ælingi. Men hetta forðaði tó ikki fyri at fáa tað burtur úr, sum kundi fáast burturúr hesum báðum døgum.



Tað var hugaligt at síggja okkara Merki veitra á Vattarnesi

Bæði á heysti og vári kundi kavi havt forðað fyri at sleppa til tey ætlaðu plássini. Tað var eisini nær við, at hetta kundi hent hesa ferð, men tað bilaði ikki.

Skráin var eitt sindur øðrvísi nú. Tann fyrra dagin var aftur farið norður til Bakkafjørðin. Fyrst varð farið í kirkjuna, har prestur greiddi frá, eins og ein søgufrøðingur greiddi frá Skálar á sunnara arminum á Langanesi.

Vit koma at greiða meira frá Bakkafjørðinum í 3. parti. Tá hava vit eisini frásøgn um Skálar, har nógvir føroyingar róðu út.

### Neskaupstaður

Seinni dagurin hesa ferð var heilt øðrvísi enn í heyst. Tó var eins og í fjør vitjað á kirkjugarðinum, har tað var sungin ein sangur og biðið Faðirvár.

Síðan var farið suðureftir, har fyrst varð vitjað á Neskaupstaði á Norðfjørðinum. Vertur her var Karl Johann Birgisson, sum er ein av leiðarunum á Sildavinnsluni, sum er tann stóra fiskivinnufyritøkan í býnum við tilsamans 2-300 fólkum í vinnu bæði á landi og umborð á skipum hjá fyritøkuni.

Karl Johan og kona hansara Maja eru kend í Føroyum, tí tey hava á ungum árum búð her, tá ið hann arbeiddi á skipasmiðjuni á Skála.

Í Neskapustaði fekk hópurin eina stórsligna móttøku. Víst varð runt á virkinum hjá Sildavinnsluni, har eisini fekst ein biti við fýra sløgum av sild umframt turran fisk og havkall, sum fyri íslendingar er tað, sum skerpikjøt er fyri føroyingar.

Vitjað varð á bygdarsavninum í Neskaupstaði, har føroyingar hittu íslendskar trolaramenn, sum hava siglt saman við føroyingum. Síðan hevði Smári Geirsson stak áhugaverdan fyrilestur um føroyskan fiskiskap á Eysturlandinum.

Hetta kom vit aftur til í komandi parti.

Aftaná bjóðaði Samvinnufelagið SUN á Neskaupstaði suppu við einum bita. At henda vitjan hevði áhuga í økinum sást eisini av, at íslendska sjónvarpið hevði samrøðu við frásøgumannin í føroyska ferðalagnum.




Perman á bókin hjá Jón Karl Úlfarsson. Vattarnes sum nógvir føroyingar minnast tað

Heilsan var eisini borin føroyingunum av Freysteinn Bjarnasyni, maskinmeistara á einum av teimum gomlu Stellu-trolarnum, sum vórðu seldir til Íslands fyrst í 70-unum. Tað vóru Laksafoss-brøðurnir, sum lótu hesar frystitrolarar byggja. Teir vóru tá ein nýhugsan í Føroyum. Hesir trolarar hava roynst sera væl í Íslandi, og teir eru í vinnu enn.

Annar í Ísland og hin í Okhotiska havinum eystanfyri Russland.

### Merkið í húnar hátt á Vattarnesi

Tað seinasta á skránni fyri dagin var vitjan á Vattarnesi. Hetta er eitt av teimum kendu útróðrarplássunum hjá føroyingum í Íslandi. Serliga

Framhald á síðu 16, 33 og 34